# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*



## Victor Danielsen í Ribarhúsi



Í sambandi við, at standmyndin av Victori Danielsen varð avdúkað sunnudagin, opnaði sera forvitnislig framsýning í Ribarhúsi í Fuglafirði, sum lýsir lív og virki Victors í teksti og myndum. Eisini eru bíbliuhandrit og annað forvitnisligt at síggja.

Framsýningin er opin hvønn dag fram til sunnudagin 19. okt. Opið er hesar tíðir: mán.-frí: kl. 15-17.30, leyg.: kl. 11-13 og sun.: kl. 15-18. Sí annars www.ribarhus.com

*Myndir: Rógvi á Lakjuni*



## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Benrosu Joensen, Klaksvík**, fer úr kapellinum á Klaksvíkar sjúkrahúsi í Christianskirkjuna mikukvøldið kl. 18.00. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni hósdagin kl. 13.30. Tey ið vilja minnast Benrosu, kunnu lata Bjargingarbátinum Ziska eina peningagávu, konta í Norðoya Sparikassa

**Kristense Gåsland,** fyrrv. trúboði í Betania, Skopun, andaðist mánadagin 29. september, 94 ára gomul. Jarðarferðin verður frá samkomuni Klippen, Bremnes, Noreg, fríggjadagin 3. oktober kl. 12 norsk tíð.

**Sofus Danielsen úr Nólsoy**, andaðist á Landssjúkrshúsinum mánadagin, 68 ára gamal. Kistan fer av Landssjúkrahúsinum mikudagin kl. 15. Jarðarferðin verður úr Nólsoyar kirkju hósdagin kl. 13.

**Marni á Lakjuni** fer til gravar úr Berøa í Saltangará mikudagin kl. 14. Hann verður jarðaður í kirkjugarðinum í Fuglafirði. Tey, ið vilja minnast Marna, kunnu lata Blákrossheiminum eina peningagávu, konta í Eik.

**Ernst Wesenberg Samuelsen**, ættaður úr Klaksvík, búsitandi í Hoyvík andaðist á Landssjúkrahúsinum 29. september, 73 ára gamal.

Jarðarferðin hjá **Torbjørg Jacobsen, Nólsoy**, verður úr heiminum mikudagin kl. 13. Tey ið vilja minnast Torbjørg, kunnu lata Føroya felag móti krabbameini eina gávu, kontur í peningastovnunum.

**Edith av Fløtum**
Tórshavn
ættað úr Porkeri

andaðist á Landssjúkrahúsinum 29. september,
84 ára gomul.
Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum
hósdagin 2. oktober kl. 17.30.
Jarðarferðin verður úr Ebenezer
fríggjadagin 2. oktober kl. 13.30.

*Fyri tey avvarðandi*
**Óla Hendrik**
**Hans, Eimy, Maud og Dorrit**

Tey, ið ynskja at minnast Edith, kunnu lata eina gávu til Kristniboðsambandið, Landavegur 98. Konta í peningastovnunum.

**Dagurin**
**2. oktober. Ditlev**. Komin upp í halgramannatal í 1725. Ókent halgimenni. Upprunaliga týskt navn, samansett av orðunum fólk og arvur.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu,
tá ið kæra mamma, vermóðir, omma, langomma og oldurommа okkara

**Lina Hansen**
(Vanliga nevnd Lina í Áninum)
Klaksvík

andaðist og varð borin til hvíldar.
Takk til Jógvan Gerðalíð fyri góð orð og sangin í kapellinum.
Takk til Poul Færø fyri góð og troystarrík orð í Betesda, eisini takk til Kjartan Simonsen og Jóhan við Neyst fyri góð orð. Takk til Torkil Mørkøre og Jógvan við Keldu, sum spældu í kapellinum og í Betesda.
Takk til Thorvald og Linu fyri heilsanir, sum blivu lisnar upp, vegna tað, tey ikki kundu vera við til jarðarferðina hjá ommu síni.
Takk fyri allan bakstur, vit fingu til ervið.
Takk til Norðoya Ellis- og Vistarheim fyri tíðina, mamma okkara var har, fyri umsorgan og røkt.
Takk fyri blómur, kransar og peningagávur til Norðoya Ellis- og Vistarheim.
Takk til øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Christian Magnus, Sámal Jákup, Sára og Hansina**